# Bøndur vunnu á myndugleikunum

**Festarar skulu ikki sjálvir hefta fyri lán til festi tí tað máar støðið undan teirra rættartrygd**

BÓNDALÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er skeivt at krevja, at festarar sjálvir skulu hefta fyri lánum til festið.

Tað heldur Løgtingsins Umboðsmaður.

Búnaðargrunnurin brúkar annars tað mannagongd at hann krevur persónliga trygd frá festarum, sum taka lán til festið.

Tað hevur Bóndafelagið ikki góðtikið og tað endaði við, at felagið legði málið fyri Løgtingsins Umboðsmann

Úrskurðurin hjá Umboðsmanninum er ein tvífaldur ósigur fyri Búnaðargrunnin.

Fyrst meinti Búnaðargrunnunin, at hann var ikki um ein partur í almennu fyrisitingini og koma sostatt ikki undir heimildarøkið hjá Umboðsmanninum.

Men Løgtingsins Umboðsmaður sigur, at ongin ivi er um, at grunnurin er ein partur í almennu fyrisitingingi og sostatt eisini er umfataður av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

Haraftafturar heldur Umboðsmaðurin, at við at krevja persónliga kautión frá festara, kann Búnaðargrunnurin seta festaran í eina vánaliga rættarstøðu, tí festarin kautionerar persónligt fyri eitt lán til festið, ið landið eigur.

Samstundis hevur festarin onga trygd fyri, at hann fær fult endurgjald fyri gjørdar íløgur á festið.

Einki í lógargrundarlagnum gevur ábending um, at ætlanin hevur verið, at grunnurin skuldi krevja persónliga kautión frá festarum fyri festilán.

Tvørturímóti bendir alt á, at ætlanin hevur verið, at Búnaðargrunnurin skal tryggja, at lán einans verða veitt til virksemi, sum hevur vinnuligt grundarlag, og at raksturin kann bera lánið.

Umboðsmaðurin metti, at kravið um persónliga kautión er ein órímilig treyt at seta festarum. Tann hátturin, sum grunnurin velur at tryggja sínar ognir uppá, stendur ikki í mát við tær avleiðingar, sum kunnu verða fyri festaran. Umboðsmaðurin bað tí Búnaðargrunnin um at taka spurningin um persónliga kautión upp til nýggja støðutakan og lata seg frætta, hvat víðari hendir í málinum.



*Tað er órímiligt at krevja, at festarar skulu hefta persónliga fyri lán, teir t aka úr Búnaðargrunninum til festið, heldur Løgtingsins Umboðsmaður*

# Ikki meiri stuðul til sethús á bygd



*Eini sethús á bygd kunnu ikki seljast fyri tað, tey kosta at byggja. Tí er trygdin hjá bankunum ikki so góð, sum í einum húsum í Havn og av tí sama krevja teir hægri rentu av sethúsum á bygd*

**Tað er verri at fíggja sethús á bygd enn tað er í Havnini, men tað er ikki eitt mál, sum landsstýrið heldur at tað er neyðugt at gera nakað við**

SETHÚSAFÍGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsstýrið fer ikki at gera tað lættari at fíggja sethús á bygd.

Tað gjørdi Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, greitt, nú hann svaraði einum spurningi frá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni.

Løgtingsmaðurin vísti á, at hús á bygd hava lægri søluvirði enn hús í Havn.

Hann sigur, at byggir tú eini hús á útoyggj, kosta tey áleið 1,2 milliòn. Tá húsini eru liðug, kanst tú neyvan selja tey meir enn 800.000 krónur, sum er 30% minni enn tey kostaðu at byggja. Hetta ger, at trupult er at fíggja bygging í útjaðaranum afturímóti í miðøkinum og ivaleyst verður lánið dýrari av tí sama, tí trygdin er minni.

Tí spurdi hann um politiskar ætlanir eru at javna henda mismunin.

Hann heldur, at tað kann verða gjørt við rentustuðlinum, so at lánarin í útjaðaranum fær hægri rentustuðul enn tann, sum byggir í miðøkinum, so rentuútreiðslurnar eru áleið tær somu?

Men hetta er ikki ein spurningur, sum Bárður Nielsen ætlar at gera nakað við.

Hann sigur, at hann er greiður um støðuna.

Men hann helt ikki, at tað var longur at fara so langt út um Havnina fyri at hetta ger seg galdandi.

Men hann metti ikki, at hetta er ein trupulleiki, sum rentustuðulin kann gera nakað við.

- Tað er ikki av fíggjarligum orsøkum, at fólk seta seg í nógv størri húsaskuld fyri at búgva í Havn. Hann væntar eisini, at tað skal meiri enn hægri rentustuðul til fyri at fáa fólk at búsetast á útoyggj.

Men landsstýrismaðurin vísti eisini á, at rentustuðulin er ein almenn skipan og hann helt, at tað var var skeivt at gera mun á fólki í hesum føri, alt eftir, hvar tey vilja búsetast.

Hann helt eisini, at prísmunurin á húsum í sær sjálvum tillagar hesi viðurskifti.

Hann vísti eisini á, at hámark er sett fyri, hvussu nógv kann fáast í rentustuðuli, saman, hvussu nógv eini hús kosta.

# Skúvoyingar missa ikki Rituna

**Ætlanin var at ein brunnbátur skuldi brúkast til farmaflutning út men skúvoyingar settu seg ímóti tí og teir fingu sín vilja**

SKÚVOYARSIGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður framvegis Ritan, sum fer at røkja farmaflutningin til og úr Skúvoy.

Tað staðfestir Jacob Vestergaard, landsstýrismaður.

Í løgtinginum spurdi Páll á Reynatúgvu um tað er rætt, at skúvoyingar fara at missa farmatúrarnar hjá Rituni og ístaðin skulu dúva uppá neyðloysn við einum brunnbáti til farmaflutning.

Tað er nú at siglingin til Nólsoyar skal økjast, at Strandferðslan ætlaði at taka Rituna úr farmasiglingini til Skúvoyar og at lata ein brunnbát føra farmin til og úr Skúvoy.

Landsstýrismaðurin vísti á, at Ritan siglir við farmi til og úr Skúvoy hvønn týsdag og ætlanin var at bøta um farmaflutningin til og úr oynni við at lata brunnbátin Dragaberg sigla við farminum ístaðin.

Støðan er tann, at viðrar ikki týsdagar hjá Rituni, kann farmaflutningurin til Skúvoyar verða seinkaður í fleiri dagar og enntá í vikur. Men kundi Dragaberg siglt við farmi helt hann at siglingin kundi verið meiri regulig. Og hann helt, at fyri so vítt kundi kundi tað gera tað sama, hvørjum báti, farmurin varð førdur í og úr oynni við.

Men skúvoyingar hava mótmælt hesum og tískil hevur Strandferðslan slept ætlanina.

Sostatt fer Ritan framvegis at flyta farm til Skúvoyar hvønn týsdag. Viðrar ikki, er ætlanin at royna at finna aðra loysn, so at farmaflutningurin ikki verður seinkaður órímiliga leingi.

Annars ætlar Strandferðslan at gera royndir við øðrum farmaflutningi til og úr Skúvoy fyri at vita um tað ikki ber til at bøta um tænastuna og reglusemið í hesum flutningi.

# Arbeiða víðari við eftirskúlanum í Hvalba

**Landsstýrið er vælviljað fyri ætlaða eftirskúlanum í Hvalba, men ymisk viðurskifti mugu útgreinast meiri, sigur landsstýrismaðurin í skúlamálum**

EFTIRSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsstýrið er sinnað at arbeiða víðari fyri at ætlaði eftirskúlin í Hvalba kann gerast veruleiki.

Tað sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum.

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, hevur spurt hann gongd er í málinum um eftirskúlan, sum ein arbeiðsbólkur skeyt upp at byggja í Hvalba.

Jógvan á Lakjuni sigur, at síðani málið varð lagt fyri landsstýrið í heyst, varð tað tikið upp í landsstýrinum, sum er vælviljað mótvegis ætlanini.

Landsstýrið vildi tó ikki seta pening av til skúlan á fíggjarlógini í ár, tí mett varð, at ov nógvir leysir endar vóru enn.

Men í ár hevur so ein fundur verið ímillum stigtakararnar, bæði kommunufeløgini og mentamálaráðið um eftirskúlan.

Jógvan á Lakjuni vísti á, at talan er um eitt stórmál, sum kostar einar 90 milliónir krónur, har av landið og kommununar betala hvør sína helvt.

Tí er hetta eitt mál, sum má fyrireikast gjølliga.

Hann vísti eisini á, at tað er neyðugt at útgreina pedagogiskt innihald og onnur viðurskifti og tað er hetta, sum nú verður arbeitt við.